

*Stórur áhugi var fyri nýggju bókini*

# kortið

Kári Mikines um nýggja stórverkið um pápan:

# – Vóni tað kann gagna Føroyum úti í heimi

Tað var ein sera fegin og vælnøgdur sonur Sámal Joensen-Mikines, sum varð hjástæddur, tá stórverkið um pápan varð lagt fram í Listaskálanum í vikuni. Kári Mikines sigur við blaðið eftir samkomuna, at hann var ovfarin av at síggja, hvussu nógv fólk vórðu við til hesa lítlu hátíðarløtuna, og at bókin eftir øllum at døma varð so væl móttikin. Hann er eisini sera fegin um og errin av at hava fingið høvi at arbeiða saman við so dugnaligum og ágrýtnum fólkum sum teimum, ið hava gjørt hetta bókaverk til veruleika. Hetta er so fyrstu ferð, at ein bók er skrivað á enskum um Mikines og vónar Kári, at hetta kann hava við sær, at listin hjá Mikines kann koma longur út í heim – koma á tað listarliga heimskortið - og harvið eisini vera við til at gera Føroyar kendar millum listamálarar og listaáhugað aðrastaðni.



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, við nýggju bókini*

skapti umstøðurnar til at virka í. Ov lítið samband var millum kelduna til íblásturin, Føroyar, og til neyðugu virkiskorini, Keypmannahavn.

Almennur mentapolitikkur snýr seg m.a. um at skapa karmar og umstøður so góðar sum til ber, til tess at listin ikki bert kann kveikjast men eisini búnast og mennast. Tað er av størsta týdningi fyri eina og hvørja tjóð, at tær kreativu kreftirnar kunnu trívast. Fyri land okkara er tað umráðandi, at so mong listafólk sum møguligt kunnu og vilja støðast her heima.

Men eitt er at skapa list, annað at gera hana kenda – at breiða út kunnleika um listina, ímillum manna, men eisini til onnur lond. Um listin skal ikki einans vera bundin at síni samtíð og tí ættarliði, hon er sprottin úr, men eisini røkka víðari til komandi ættarlið, má eitt áhaldandi kunnandi arbeiði gerast. Vit ynskja ikki, at William Heinesen, Mikines og Ingólvur av Reyni og allir hinir mongu listamálarar okkara skulu fara í gloymskuna, Teir skulu framvegis vera ein partur av samleika okkara og av teirri mynd, umheimurin hevur av Føroyum.

Eg skal vegna Mentamálaráðið takka forleggjara og høvundum hjartaliga fyri, at vit við hesi stórtøknu og prýðiligu bókaútgávu hava fingið eitt virðismikið íkast til hesa tilgongd. Við hesum trimum útgávum á føroyskum, donskum og enskum kann kunnleikin um Mikines røkka til norðurlond og eisini tann stóra ensktalandi alheimin. Hetta fegnast vit um. Enn einaferð tøkk øll somul!

# Virðiligur varði reistur Sámal Joensen-Mikines

**- Í dag verður reistur ein virðiligur varði eftir eitt av størstu listafólkum okkara – Sámal Joensen-Mikines. Slíkir varðar hava alstóran týdning – bæði fyri okkum, sum nú liva, og fyri komandi ættarlið. Tí eru eingir varðar, so kámast gøturnar, og farvegurin eftir tey, sum undan gingu, tekur at hvørva segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður m.a., tá nýggja bókin um Sámal Joensen-Mikines varð løgd fram í Listaskálanum í vikuni. Hann segði:**

MIKINES 100



*Løgmaður fær handað fyrsta eintakið av bókini*

- Mangt forvitnisligt er skrivað um Mikines ígjøgnum árini, og hetta nýggja bókaverk er eitt frálíkt íkast til tær bøkur, ið áður eru skrivaðar um listamannin. Verkið er serstakliga umfatandi og prýðiligt, tað er ævisøga og greining í einum, tað tekur samanum og lýsir Mikines sera væl, bæði sum menniskja og sum listamann, og hartil er tað ríkað við fotomyndum og einum góðum úrvali av listaverkum hansara.

100 ár eru liðin, síðan Sámal Joensen-Mikines varð borin í heim í Mykinesi. Hann kendi seg alt sítt lív tætt knýttan at heimbygd síni, oynni og fólkinum har, og við lívsverki sínum hevur hann givið okkum eitt virðismikið og virðiligt innlit í, hvat hetta var fyri eitt samfelag í fyrru helvt av farnu øld. Náttúruna hevur hann lýst – eggjarnar, ið daga ímóti luftini, bjørgini, tað grøna grasið, brimið ið brýtur á Kumlagrynnuni, stormin og regnið. Alt hetta er har enn, og tað verður verandi, hvussu tíðir annars broytast. Tað ber ikki til at koma upp á oynna uttan at hava pensilsstrokini hjá Mikines í huganum.

Men hann málar eisini bygdina, húsini og túnini, og tá er tíðin ein táttur í dramanum. Hann málar menniskjuni – hugtakandi andlitsmyndir av mykineskonum og -monnum. Hann málar konuna, ið stendur á berligari strond saman við børnunum og eygleiðir skipini, ið seta kós móti Íslandi. Hann málar tey, ið eftir sita í angist og bíða, og hann lýsir neyðina, vónloysið og saknin, tá ið deyðsboðini koma. Hann lýsir sorgina, men eisini vónina og trúnna.

Alt hetta eru ævigar treytir, ið menniskjuni hava at geva seg undir, og sum øll rættilig listaverk eru málningarnir hjá Mikines tíðarleysir. Men samstundis mega vit ásanna, at lívið á útoyggj í fyrra helmingi av 20. øld var á allan hátt øðrvísi enn nú. Í veruleikanum hava vit ilt við at skilja hesi menniskju, ið máttu takast við náttúrukreftirnar undir sera hørðum treytum.

Hvaðan fingu tey seiggið og treystið? Í listini ber til at nærkast eini sannførandi lýsing. Samstundis sum listaverkini hjá Mikines eru tíðarleys, eru tey eisini ein tíðarlýsing, ið kann hjálpa okkum føroyingum til at skilja okkara søguligu fortreytir og ásanna okkara samleika.

Tað er av stórum týdningi, at kunnleikin um henda nýskapandi listamann ikki fánar burtur, men verður hildin viðlíka og mentur. Vegna Føroya fólk takki eg forlagnum Nesútgáfan fyri, at tað tók stig til hesa glæsiligu bókaútgávu. Og Aðalsteinn Ingólfsson, rithøvunda, fyri megnararbeiði. Tað er vón mín, at bókin vil gera sítt til at spjaða kunnleika, soleiðis at ungfólkið og komandi ættarlið eisini fáa høvi til at læra Mikines at kenna segði løgmaður.